# Gjørdist sambandsmaður í barnaføðingardegi

**Nýggi bygdarráðsformaðurin í Sørvági hoyrdi so nógv um politikk í familjuføðingardøgunum, at hann gjørdi av at fara aktivt upp í hetta og gerast sambandsmaður burturav**

PERSÓNSLÝSING
*Edvard Joensen*



*Lokalpatriotisman er við at fara, metir Eivind Jacobsen, nýggjur bygdarráðsformaður í Sørvági*

Eivind Jacobsen tekur á nýggjárinum við sum bygdarráðsformaður í Sørvági. Og tað er ein einmælt avgerð í bygdarráðnum, at hann skal verða formaður komandi fýra árini.

Men ikki er tað heilt ókent fyri honum heldur, arbeiðið í bygdarráðum. Hann hevur sitið í bygdarráðnum i Sørvági síðan 1992. Fyrst fýra ár sum næstformaður, síðan sum vanligur limur, og nú hann er valdur triðju ferð, verður hann formaður.

Hann er 43 ára gamal, hesin erka sambandsmaðurin, sum sigur seg vera sørving burturav, ið føddur er í Skopun. Og hann gjørdist sambandsmaður í barnaføðingardøgunum í familjuni, har onkur var, sum altíð vartaði upp við politiskum hugsanum.

– Tá vóru tvey ting at velja ímillum, sigur Eivind. At fara aktivt upp í politiskt arbeiði ella púra at fáa vaml. Sálvur valdi hann tað fyrra, og hevur higartil hildið seg til kommunalpolitikkin.

Hann hevur verið formaður í Vága Sambandsfelag og sigur seg vera ein av teimum sambandsmonnunum, sum ganga inn fyri víðfevnandi broytingum á ríkisrættarliga økinum.

Hann er maskinsmiðurog arbeiðir sum sløkkiliðs- og arbeiðsleiðari á flogvøllinum.

Tað er leygardagur seinnapart. Tað skýmir, og perur og annað jólapynt skyggir í hvørjum vindeyga í Sørvági, tá vit koyra oman gjøgnum bygdina fram við kommunuskrivstovuni, sum nú er prýdd við búmerki á galvinum. Snara til vinstru og niðan brekkuna, har konan Asta tekur ímóti, tá bankað verður uppá.

Asta, sum eisini er úr Sørvági, arbeiðir í bankanum, og tey eiga trý børn. Yngsti sonurin, sum er inni, nú Sosialurin vitjar, heldur kortini, at tað skuldi verið flokslærarin, sum eisini er bygdarráðslimur, ið gjørdist formaður heldur enn pápin. Tí so høvdu tey helst fingið fleiri frítímar úr skúlanum.

## Tung skuldarbyrða

Sørvágur var ein av teimum hygdunum, sum varð hart rakt av kreppuni í nítiárunum. Skuldin var rættiliga stór, og av tí sama er alt ov lítið gjørt seinnu árini, annað enn at gjalda skuld niður.

Men tað hevur Sørvágs Kommuna so gjørt afturfyri. í 1992 var skuldin 40 milliónir, og er í dag komin niður á 15 milliónir. Men so er so mangt annað, sum átti at verið gjørt, sum hevur ligið og bíðað. Og hóast tað sær betri út nú, kann ikki væntast, at tað hendir so øgiliga nógv beinanveg kortini. Tí íløgujáttanin hjá Sørvágs Kommunu er bara 3,4 milliónir.

Annars er Sørvágs Kommuna sera tung at reka, sigur Eivind Jacobsen. Bygdin er soleiðis háttað, at bara komunalu vegirnir eru heilar 10 kilometrar til longdar. Havn er sum skal haldast, og skúli er eisini, sum Sørvágs Kommuna skal reka einsamøll.

Hann nevnir grannarnar, Miðvág og Sandavág, sum samstarva um bæði havn og skúla. Og tað sigur seg sjálvt, at tað er lættari.

Ein stórur partur av kommunuskuldini í Sørvági stavar frá nýggja skúlanum, sum bygdur varð í áttatiárunum. Og samstundis sum alt annað leyp undan, misti Sørvágs Havn eisini ein stóran part av sínum inntøkum, tá farmaskipini góvust at sigla til Sørvágs. Avgreiðslurnar vóru niðurlagdar, og allar avskipingar fóru um Tórshavnar Havn, hagar fiskurin, sum útflutur verður, varð fluttur við bili.

– Tað er greitt, at slíkt merkist, sigur Eivind Jacobsen, nýggjur bygdarráðsformaður í Sørvági.

## Átroðkandi mál

Onkur rættiliga átróðkandi mál eru, sum nýggja bygdarráðið eigur at fáa avgreidd, sigur Eivind Jacobsen.

Eitt er at fáa landsvegin gjøgnum Sørvág til Bíggjar gjørdan. Og eitt annað er at fáa gjørt ídnaðarøki klárt til at taka í móti eini komandi oljuvinnu.

Í hesum seinna førinum hugsar hann um at gera iett ídnaðarøki oman fyri flogvøllin, við gráa eingilskmannahúsið.

Her verður tó neyvan nøkur byggibúgving gjørd beinanveg. Heldur verður bíðað eftir, hvar ein møgulig olju- ella útgerðarhavn verður løgd. Men økið liggur væl fyri beint við flogvøllin, og eingin ivi er um, heldur nýggi bygdarráðsformaðurin í Sørvági, at flogvøllurin fer at spæla ein týðandi lut í eini komandi oljuvinnu.

Her eigur at fáast eitt neyvari samstarv millum kommunurnar í Vágum, heldur Eivind Jacobsen.

Hitt stóra málið, sum má fáast frá hondini sum skjótast, er nýggi bíggjarvegurin.

Samtykt er, hvussu hann skal liggja, og so er bara at koma í gongd, heldur bygdarráðsformaðurin.

Vegurin skal gerast av nýggjum oman gjøgnum bygdina, oman móti sandinum. Har fer hann at sneiða út við landinum, til hann verður bundin í verandi veg til Bíggjar.

Nakrir fyrispurningar um grundstykki í Sørvági eru eisini. Og tað er eingin trupulleiki, sigur Eivind Jacobsen. Grundstykki eru til. Bæði kommunal og privat. Hann væntar tó ikki, at tað verður nøkur bíðirøð sum so, tá undirsjóvartunnilin verður liðugur. Men eina javna tilgongd væntar hann. Og fólk , sum ætla at seta búgv í Sørvági,noyðast at byggja, tí so at siga eingi hús standa tóm í bygdini.

Men barnaansing hevur Sørvágur ongar trupulleikar av. Bygdin fekk barnagarð í teimum ringastu tíðunum i nítiárunum, og tørvurin er nøktaður sum er.

Av arbeiðsplássum í Sørvági eru tað tey vanligu í fiskivinnuni umframt tey, sum eru á flogvøllinum.

Hóast flogvøllurin hvørki er kommunal- ella landsuppgáva, men danskur burturav, hevur tað sjálvandi størsta áhuga fyri sørvingar, hvat hendir har uppi.

Og Eivind Jacobsen harmast um, at tað dregur út við útbyggingum, sum hann metir vera dotna niður í millum føroyskar og danskar myndugleikar í fullveldismálinum.

## Væntar meira samstarv

– Lokalpatriotisman er við at fara, metir Eivind Jacobsen, nýggjur bygdarráðsformaður í Sørvági. Hann væntar eina kommunusamanlegging nakað skjótt. Tað er bara ein spurningur um tíð, metir hann. Tá Løgtingið hevur sett sær tað sum mál, man lítið vera at ivast í, at so verður, heldur hann.

Hann ætlar ikki, at tað skulu verða tær stóru broytingarnar við persóninum Eivindi Jacobsen, hóast hann nú er vorðin bygarráðsformaður.

Hann fer framvegis at røkta Suðurtriðing og hava bátin, sum hann hevur saman við beiggjanum, liggjandi í bátahylinum.

– Men eitt vænti eg, leggur konan, Asta skemtandi uppí. Nú báðir røktingarmenninir eru vorðnir ávikavist formaður og næstformaður í bygdarráðnum, verður lovaða vetrarfriðingin av bygdini gjøgnumførd heilt skjótt.

Eivind leggur seg aftur á í stólinum yvir av mær. Leggur samanløgdu hendurnar undir nakkan, smílist hinumegin kaffikannuna og sigur einki.

– Tað fáa vit at síggja, tekur hann so aftur í aftur eina løtu seinni. Men ítróttinum ætlar hann iki at sleppa.

Serliga er tað fótbólturin, sum stendur nær. Eivind hevur verið nevndarlimur í SI. Eitt nú í tíðarskeiðnum, tá nýggja húsið við fótbóltsvøllin varð bygt. SÍ luttekur bara í yngru deildunum, so tá talan er um vaksnamannadeildirnar, er tað FS Vágar, tosað verður um.

Og so plaga tey at fara Upp á tá. Tað ganga tey høgt uppí heima hjá nýggja borgarstjóranum í Sørvági.



*Eivind Jacobsen er 43 ára gamal, hesin erka sambandsmaðurin, sum sigur seg vera sørving burturav, ið føddur er í Skopun*



# Ársins stjørnuskot ár 2000

**Brandur Enni á Tvøroyri hevur í ár 2000 tikið føroysku áhoyrarafjøldina á bóli og er uttan iva størsta og nýggjasta stjørnuskot í ár 2000. Men spyr ein 11 ára gamla sangaran, hvussu tað kennist at vera kendur, sigur hann lítillátin:**
**– Eg haldi ikki, at eg er so kendur**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*



*Í hugnaligu stovuni hjá Enni á Tvøroyri situr 11 ára gamli Bandur og greiðir frá. Hann er frálílkur cornett spælari og er rættiliga vorðin kendur sum sangari, eftir at hava verið við á fløgunum MánadagsMortan og Kular Røtur Nummar 2 og 3.*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

Kular Røtur úr Klaksvík hava rættiliga gjørt um seg í árinum, sum nærum er farið. Steintór Rasmussen og Ingi Isaksen úr Klaksvík eru tveir ov orkudeplunum aftanfyri Kular Røtur, umframt leikarar og sangarar úr Klaksvík.

Men afturat sær hava Kular Røtur eina góða rødd av Tvøroyri. Røddina eigur 11 ára gamli Brandur Enni. Brandur Enni kom rættiliga fram, tá hann í 1999 var við á fløguni hjá Jens Mortan Mortensen, ið nevndist MánadagsMortan.

Jens Mortan hoyrdi tann tá 8 ára gamla Brand til eina jólakonsert í høllini í Trongisvági og síðani kom hann við á fløguna MánadagsMortan, sum kom út í desember í 1999. Umvegis Gissur Patursson og pápabeiggja Brand, Birgir Enni, kom samaband í lag millum Steintór Rasmussen og Brand. Úrslitið var, at Brandur sang við á Kular Røtur II, sum kom út fyrst í ár 2000. Har sang Brandur Hundur mín Kingoson og Heyg og Lág.

## Ongantíð ætlanin

Brandur Enni er við síni vøkru rødd og frálíka sangi óivað stórsta stjørnuskot í ár 2000. Men tað stuttliga við hesi søguni er, at tað ikki var ætlanin, at Brandur skuldi við á nakra fløgu hjá klaksvíkingunum. Hann var í fyrsta umfarið bert biðin um at syngja til eina konsert á Kambsdali. Har sungu Brandur og eldri bróður hansara Trónndur (eisini kendur úr Wild Child) nakað av tí, ið teir høvdu sungið, tá føroyskt kvøld var á Broadway í Íslandi. Eftir hetta var leyst og liðugt og Brandur gjørist ein teirra, ið sang á fløguni Kulum Rótum 2. Fyri jól kom Kular Røtur 3 og videoband. Brandur syngur har eitt kvæðakent popplag, nevnt Bókin, og sangin um Jólamannin.

## Strævi

Brandur er av familju, ið er í tónleikaheiminum. Mamman og pápin spæla í Tvøroyrar Hornorkestri, og tað gera øll børn teirra. Um jólini spældi Tvøroyrar Hornorkestur í Vágs Kirkju og har spældi Brandur Enni frálíkt solo á cornett. Hann hevur spælt horn síðani skúlaaldur. Bróður hansara, Tróndur, hevur í hálvt triðja ár lisið tónleik í Íslandi, eisini hann leikar horn, umframt at leika bassguitar.

Uppá spurningin, hvussu tað er at vera kendur, sigur Brandur lítillátin: Eg haldi ikki, at eg eri so kendur!

Tó er tað hent, at onkur, ið hann slett ikki kennir, hevur spurt hann, um hann er Brandur?

– Vinmenninir taka tað tó helt pent og einki er broytt í so máta, sigur Brandur.

Um lívið í einum upptøkuhøli sigur Brandur Enni, at tað kann vera strævið. Har ganga hálvir ella heilir dagar við at syngja ein sang inn og so skal alt takast og hoyrast umaftur og umaftur.

## Framtíðin

Um framtíðina sigur Brandur, at ætlanir eru um at umseta teir bestu sangirnar hjá Kulum Rótum til enskt og at royna hetta á altjóða marknaðinum.

Umframt skal Brandur til Íslands í januar. Hann hevur frí úr skúlanum á Tvøroyri í 3 vikur og skal ganga í skúla í Íslandi. Føroyskir dagar eru á tí, ið nevnist Fjørðukráin, har ymisk listafólk úr Føroyum luttaka. Tróndur og Brandur luttaka har og møguliga skulu teir eisini í morgunsendingina hjá íslendska sjónvarpinum.

11 ára gamla sangstjørnan av Tvøroyri hevur úr at gera, men á Tvøroyri gongur alt sína vanligu gongd og somuleiðis gerandisdagurin hjá einum av stjørnuskotunum í ár 2000.

# Tróndur og Blálýsi í Oynni

**Fyri fyrstu ferð, síðani einaferð í sjeytiárunum, sýnir Tróndur Patursson fram list sína í Suðuroynni. Á Tvøroyri er frálíkt framsýningarhøli, nevnt Gallarí Oyggin, og her hava suðuroyingar møguleika at njóta nakað av málninga- og glaslist eftir listamannin úr Kirkjubø**

LIST
*Dagfinn Olsen*



*Í stuttari røðu, tá sýningin í Gallarí Oynni lat upp, fegnaðist Tróndur Patursson um stásiligu hølini og samanbar tað at búgva í Føroyum við at búgva á boriplatformi: ein sær altíð vatn. Framsýningin á Tvøroyri í hesum døgum ber heitið Blálýsi*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

Einaferð í sjeytiárunum hevði Tróndur Patursson framsýning í skúlanum í Vági. Nú hava suðuroyingar aftur møguleika at síggja list eftir Trónd Patursson. Fyri ári síðani lat upp Gallarí Oyggin á Tvøroyri, og her lat Tróndur upp sýning tann 21. desember.

Oyggin hevur samstarv við Norðurlandahúsið og mong listafólk hava sýnt fram har, síðani latið varð upp.

## Vatnkenslan

Tróndur sýnir fram 24 verk. Talan er um glaslist og málningar, umframt prentlist.

Sýningin kallast Blálýsi og blátt er eitt slag av felagsnevnara í listini hjá Tróndi á sýningini – bæði innan máling og glas.

Tróndur segði í stuttari røðu, tá sýningin lat upp, at hann t.d. heldur enn fjallið sjálvt, tekur spegilsmyndina í vatninum av fjallinum, tí so verður fjallið blátt. Tróndur samanbar tað at búgva í Føroyum, við at búgva á einum boriplattformi. Vit síggja altíð vatn.

Hann nevndi eisini, at danir hava sagt um listina hjá Tróndi Patursson, at talan er um vandfølelse – vatnkenslu.

Málningarnir hjá Tróndi eru sokallaðir tempara. Blátt og svart og serstaka málingin ger, at tað bláa líkasum treingir seg fram, lýsir sjálvt, og skapar dýpt og rúm.

Tróndur fegnaðist um nýggju hølini á Tvøroyri. Hann helt vera gleðiligt, at møguleiki er at sýna fram í Suðuroynni og fegnaðist um at vera aftur. Hølini metti hann ikki standa aftanfyri mong av teimum hølum, ið hann hevur sýnt fram í millum ár og dag.

Tróndur las miðskeiðis í sekstiárunum list í Danmark og fram til 1973 í Noreg. Síðani hevur hann havt framsýningar í Føroyum og úti í stóru verð og hevur eisini ferðast víða á spennandi ferðum, ið eisini hava verið íblástur.

Í Oynni eru eisini myndir av hesum ferðum. T.d. myndarøðin Mobydick. So um onkrum suðuroyingi ikki eydnast at síggja augustin, sum liggur á sandinum í Hvalba í hesum døgum, so ber til at leita sær í Gallarí Oynna at síggja Moby.